Karsten Hansen gjørt uppreistur í Tinganesi

Ætlanin hjá landsst‡rinum at tvinga allar føroyingar at betala 2% av lønini í ein eftirlønargrunn frá 1. januar er eitt slag beint í andliti›. Hetta má vera ein avlei›ing av, at Karsten Hansen hevur gjørt uppreistur í Tinganesi, heldur Starvsmannafelagi›

EFTIRLØN
Áki Bertholdsen

– Ta› má hava veri› uppreistur í Tinganesi.

Gunnleivur Dalsgar› ivast ikki í ætlanin hjá landsst‡rinum, at tvinga allar føroyingar, at er eitt úrslit av, at Karsten Hansen hevur gjørt uppreistur í Tinganesi.

– Hann veit, at sáttmálasamrá›ingarnar nærkast og hann følir á sær, at nú er ta› fari› at sansa at. Ti hevur hann gjørt uppreistur og hevur tiki› máli› um eftirlønina í egnar hendur.

Forma›urin í Starvsmannafelagnum sigur, at trupulleikin er bara ta›, at Karsten Hansen veit ikki, hvat hann hevur vi› at gera.

– Higartil hevur ta› veri› Helena Dam á Neystabø, landsst‡risma›ur í almanna og heilsumálum, sum hevur arbeitt vi› eftirlønarskipanini.

– Ta› var eisini komi› hartil, at fakfeløgini høvdu sett ein arbei›sbólk at arbei›a vi› málinum og at gera uppskot um, hvussu farast kundi fram, tí ein trupulleiki er, at fleiri fakfeløg hava longu eftirlønarskipanir.

– Hesin arbei›sbólkurin er komin so langt, at hann hev›i helst ver›i› li›ugur í hesum árinum.

– Men nú hendir so brádliga ta›, at Karsten Hansen ger uppreistur í Tinganesi og tekur máli› úr hondunum á Helenu Dam á Neystabø, tí hann vil hava okkurt at henda, á›renn sáttmálasamrá›ingar byrja aftur.

Men úrsliti› ver›ur helst ta› beint øvugta av tí, sum ætlanin var.

Hetta skapar órógv í ólukkumát, sigur Gunnleivur Dalsgar›



Karsten Hansen hevur gjørt uppreistur í tinganesi, Men hann veit ikki, hvat hann ger, sigur Gunnleivur Dalsgar›

Ørkymla›ur

Gunnleivur Dalsgar› sigur, at hetta er eitt so dygt slag í andliti› á fakfeløgunum, at hann hevur valla or› fyri tí.

– Hevur fløkjan um eftirlønina veri› stór, er hon nú blivin fullkomin.

Í sta›in fyri at vi›ger›a máli› sum eina eftirløn, hevur Karsten Hansen nú vavt ta› saman, og gjørt ta› til ein spurning um eftirløn, uppsparing og skattamál í einum.

Hann sigur, at landsst‡ri› hevur kunngjørt, at nú skal samband takast upp vi› fakfeløgini um máli›.

– Hetta er sum at skjóta fyrst og spyrja aftaná. Ta› er onki endamál at tosa vi› fakfeløgini, tá i› avger›in er tikin.

Forma›urin í Starvsmannafelagnum sigur, at hann veit ikki, hvat nú fer at henda.

Hann sigur, at ta› fyrsta ver›ur at seta seg inn í ætlanin hjá landsst‡rinum. Í løtuni eru so nógvir leysir endar, at ta› ber ikki til at vi›gera uppskoti› nágreiniliga

– Men hetta er ein eykaskattur uppá 2%.Og ta› fer uttan iva at ávirka samrá›ingarnar, sum vera í vár. Karsten Hansen eigur at vera púra grei›ir yvir, at hetta fer at føra til álvarslig krøv, tá i› samrá›ingarnar ver›a aftur.

Sum er, betalir Starvsmannafelagi› longu 5,5% í eina eftirlønarskipan og eina tryggingarskipan.

– Ongin veit, hvar hendan skipanin fl‡tur í løtuni og ta› mugu vit hava grei›i á, sigur Gunnleivur Dalsgar›.

– Hetta er fullkomiligur ru›uleiki og eg skuldseti landsst‡ri› fyri ikki at vita, hvat ta› ger, leggur forma›urin í Starvsmannafelagnum afturat.

Skulu betala 2% meiri í skatti á n‡ggjárinum

– Ætlanin at tvinga allar føroyingar at betala 2 % í eina eftirlønarskipan, er onki uttan ein eykaskattur. Sostatt hevur fólkaflokkurin broti› sítt lyfti. Og at tjó›veldisflokkurin gó›tekur hetta, skiilji eg onki av, sigur Ingeborg Vinther

EFTIRLØN
Áki Bertholdsen

– Hetta er fullkomiligur ørskapur.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbei›arafelag sigur, at avger›in um at tvinga allar føroyingar til at 2% av lønini í ein eftirlønargrunn, vísir, hvussu líti› hald er í lyftunum frá okkara politikarum.

– Fólkaflokkurin hevur alla tí›ina lova› okkum skattalalætta. Men nú fáa vit ísta›in ein eykaskatt uppá 2%.

Hon sigur, at Fólkaflokkurin hevur lova› skattalætta, umframt skattalætta í samband vi› pensjónina.

– Nú hava vit so fingi› prógv fyri, hvat lyftini vóru verd.

– Men at tjó›veldisflokkurin skal gó›taka slíkt, skilir hon púrt onki av, tí n‡ggja eftirlønarskipanin er borgarligur politikkur, tá i› hann er best.

Ingeborg Vinther sigur, at eftir teirri n‡ggju eftirlønarskipanini, fara fólk vi› høgari lívsløn at fáa høga eftirløn og øvugt.,

– Sostatt skal stættarmunurin sta›festast líka í grøvina. Hetta er ikki verkamannapolitikkur og eg skilji ikki at tjó›veldisflokkurin gó›tekur hetta. Men so er ta› sta›fest, at hann hevur tveitt øll prinsipp fyri bor›.

– Nú hava vit fingi› vátta, at onki hald var í lyftunum hjá fólkaflokkinum um skattalætta, sigur Ingeborg Vinther

Forkvinnan í Føroya Arbei›arafelag sigur, at hon hevur alla tí›ina mælt til at útbyggja samhaldsfasta eftirlønarskipanina í sta›in.

– Ta› er ein skipan sum virka væl. Øll gjalda í hana eftir evnum, men øll fáa ta› sama úr henni aftur á ellisárum. Ta› er ein samhaldsføst skipan.

Ísta›in ætlar landsst‡ri› at smoyggja eina skipan yvir høvdi› á løntakarunum, uttan at tey fáa nakra høvi at ávirka máli›

Ingeborg Vinther ivast ikki í, at feløgini fara at taka máli› upp. Men hvussu ta› ver›ur gjørt, veit hon ikki enn.

Nokta at betala meir

– Vit hava longu eina eftirlønarskipan sum er, og vit gó›taka ikki at betala meir, sigur forma›urin í Sjúkrasystrafelagi›

EFTIRLØN
Áki Bertholdsen

– Vit betala longu til eina eftirlønarskipan. Og vit fara ikki at gó›taka, at betala meir.

Joan Ziskason, forkvinna í sjúkrasystrafelagnum er ørkymla av bo›unum úr Tinganesi um, at 1. januar skulu øll betala 2% av lønini í eina eftirlønarskipan.

Hon sigur, at sjúkrasystrarnar hava eina eftirlønarskipan, har tær sjálvar betala 4% og arbei›sgevarin 8%.

– Og vit fara ikki at gó›taka at betala meir, sigur Joan Ziskason.

-Vit gó›taka onga skipan, sum ger at vit ver›a verri fyri, enn vit eru nú, sigur Joan Ziskason, forkvinna í Sjúkrasystrafelagnum

Skulu vit betala 2% í eftirløn afturat, er hetta ta› sama sum at fara ni›ur í løn og ta› gera vit ikki. Vit fara helkdur ikki at betala til tvær skipanir. Og vit fara heldur ikki at gó›taka eina skipan, har sjúkrasystrar ver›a verri fyri, enn tær eru nú.

Hon sigur, at tey hava krav uppá at frætta meiri um ætlanina.

Hon undrast eisini á, at ta› nú er Karsten Hansen, sum hevur yvirtiki› eftirlønarmáli›.

– Fyrst var ta› vinnumálast‡ri›, sum tók spurningin um eftirløn upp. So fór máli› yvir í almanna og heilsumálará›i›, men nú er ta› brádliga enda› í fíggjarmálast‡rinum.

Joan Ziskason sigur, at ta› er ørkymlandi, at eftirlønin solei›is liggur og fer›ast ímillum st‡rini.

Hon ivast eisini í, hvør dugur er í eini eftirløn upp á 2%.

– Ein slíkur eftirlønargrunnur ver›ur ongantí› til anna› enn eitt ískoyti til fólkapensjónina.

Joan Ziskason sigur eisini, at ta› er ein spurningur um ikki eftirlønarskipanin gongur beint ímóti ymsum ásetingum í sáttmálanum, sum tey hava og tí er ta› ikki vist, at hetta er eitt mál, sum er lætt at loysa.

Skulu sjálv rinda pensjónina

Landsst‡ri› arbei›ir vi› einum uppskoti um eina n‡ggja pensjónskipan, sum arbei›stakarin sjálvur skal rinda. Afturfyri fáa tey lágløntu skattalætta

PENSJÓNSSKIPAN
John Johannessen

Stendur ta› til landsst‡ri›, kemur ein n‡gg pensjónsskipan í gildi 1. januar.

Talan ver›ur um eina sokalla›a arbei›smarkna›arpensjón, i› inniber, at allir arbei›stakarar gjalda tvey prosent av lønini í skipanina. Aftur fyri fáa arbei›stakararnir eitt javnt útgjald svarandi til ta›, teir hava goldi› inn í hana, tá teir eru vor›nir pensjónistar.

Uppskoti› hjá landsst‡rinum inniheldur eisini ein skattalætta til tey lægst løntu. Hesin skattalætti ver›ur hægri enn tey tvey prosentini, sum arbei›stakarin rindar inn í skipanina. Tískil koma tey lágløntu at merkja ein fyrimun av skipanini beinan vegin, hon kemur í gildi.

Ikki li›ug

Hendan n‡ggja skipanin var fyri á landsst‡risfundi mánadagin, men hon er ikki heilt li›ug enn. Í gjár skuldu embætisfólk í Fíggjarmálast‡rinum gera neyvar útrokningar til uppskoti›. Men teldukervi› í Fíggjarmálast‡rinum var í ólagi til á middegi, tí bar ikki til at fáa neyvar uppl‡singar um, hvussu skattalættin ver›ur skipa›ur og hvørjar upphæddir talan ver›ur um.

Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum, sigur tó, at hann roknar vi›, at ein persónur, sum vinnur 250-.000 krónur, kemur orsaka› av skattalættanum at hava ta› sama eftir, sum hann hevur havt higartil, tá hann hevur rinda› tey tvey prosentini í pensjónsskipanina.

Skattalættin inniber, at botnfrádrátturin hækkar. Men fyri at hetta ikki skal vera til størstan fyrimun fyri tey, i› vinna nógv, ætlar landsst‡risma›urin í fíggjarmálum at broyta stigan í botfrádráttinum.

– Endamáli› hjá okkum er, at tey lægt løntu skulu fáa mest burturúr, sigur Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum.

Hvussu stigin í botnfrádráttinum ver›ur broyttur, veit Karsten Hansen heldur ikki at siga nágreiniliga, orsaka› av, at teldukervi› í Fíggjarmálast‡rinum hevur veri› í ólagi.

Fólkapensjónin burtur

Karsten Hansen sigur, at fólkapensjónin kemur at lúta fyri n‡ggju pensjónsskipanini, tá hon er komin at virka.

– Tali› av pensjónistum veksur so skjótt, at vit skjótt ikki hava rá› til at rinda teimum øllum fólkapensjón yvir skattin. Tí er ta› umrá›andi, at vit finna hóskandi skipan, sum vit kunnu fáa í sta›in, sigur Karsten Hansen.

Fólkapensjónin ver›ur kortini ikki heilt burtur. Landsst‡ri› ætlar nevniliga, at fólkapensjónin skal vera ein veiting fyri tey, sum ikki hava veri› á arbei›smarkna›inum og tey, sum hava vunni› so líti› á arbei›smarkna›inum, at pensjónsuppsparingin ikki er vor›in nóg stór til at kunna liva av.

Á henda hátt heldur landsst‡ri›, at ta› tryggjar samhaldsfesti› í skipanini.

Um arbei›sgevararnir ella arbei›stakararnir eru teir, sum skulu rinda inn í skipanina, metir landsst‡ri› vera ein samrá›ingarspurning til komandi lønarsamrá›ingar.

Landsst‡ri› ætlar, at n‡ggja skipanin skal koma í gildi 1. januar. Men enn er landsst‡ri› ikki heilt li›ugt vi› skipanina, millum anna› vantar at rá›føra seg vi› fakfeløgini.

Endamáli› vi› n‡ggju pensjónini er, at øllum arbei›stakarum skal vera tryggja ein arbei›smarkna›arpensjón

Starvsfólki› á b‡rá›num fingi› svar

B‡rá›sforma›urin roknar vi›, at starvsfólki› á b‡rá›num hevur tiki› svari› frá fíggjarnevndini til eftirtektar. Álitisfólk vilja ikki siga naka› um máli› og hava enn einki anna› stig tiki›

Skrivi›, i› starvsfólk sendu b‡rá›sformanninum og sum var› beint í fíggjarnevndina, hevur veri› til vi›ger›ar, og b‡rá›sforma›urin heldur, at starvsfólki› hevur tiki› svari› til eftirtektar

B†RÁ‹SUMSITINGIN
Stefan í Skorini

– Vit hava svara, og eg gangi út frá tí, at tey hava tiki› svari› til eftirtektar, sigur Leivur Hansen, b‡rá›sforma›ur, sum eisini er forma›ur í fíggjarnevndini í b‡rá›num.

– Vit hava sent teimum okkara svar, og sí›ani hava vit ikki hoyrt naka› aftur, sigur b‡rá›sforma›urin.

– Vit halda, at hetta er eitt innanh‡sis mál, sum vit eiga at kunna avgrei›a uttan íblanding uttanifrá, sigur Leivur Hansen.

Álitisfólk í b‡rá›num vilja ikki gera nakra vi›merking til svari›, sum tey hava fingi› frá b‡rá›num.

Starvsfólkini vóru ónøgd vi› vi›fer›ina, tey fingu frá lei›sluni, millum anna› tá starvsfólk vór›u flutt. Enn eru tey ikki farin ví›ari vi› hesum máli, og álitisfólkini vilja ikki siga naka› um svari› frá fíggjarnevndini.